

*Kórleiðarin var komin úr Noregi at undirvísa teim umleið 235 luttakarunum á sangskeiðnum í Nesvík*

Sangskeið í Nesvík:

# Syngja 5 tímar um dagin

**Í heystfrítíðini skipaði Heimamissiónin aftur fyri árliga sangskeiðnum í Nesvík. Eini 235 fólk luttóku, og leygardagin endar alt við einum braki av eini konsert í Norðurlandahúsinum**

SANGSKEIÐ
*Ragnhild Ellingsgaard*
*Myndir: Finnur Justinussen*

Sangurin hoyrist heilt út í túnið, og gerst spakuliga harðari og harðari, sum vit nærkast úthúrðini. Tá vit eru komin innar er einki at taka feil av - í Nesvík er sangskeið, og tey eru nógv, sum eru við.

Vit fara innar í salin, har stóra kórið júst er farið aftur til venjingar. Við kønari hond leiður norski kórleiðarin kórsangararnar gjøgnum tónar av Black Gospel-løgum, og sambært andlitsbrøgdunum á luttakarunum eru tey væl nøgd.

"Be Strong In The Lord..." og "I Can Do Anything..." eru reglur, sum verða tiknar umaftur og umaftur, nú Sosialurin vitjar sangskeiðið, sum Heimamissiónin skipar fyri á hvørjum ári.

Um 160 vaksin og 75 børn eru millum luttakararnar hesu ferð, og afturat øllum teimum skulu hjálparfólkini eisini teljast. So leguhúsið í Nesvík er fult av fólki, og hetta merkist eisini, tá vit koma á vitjan.

Í gongini renna smábørn runt, meðan onkur vaksin situr og hvílur seg í sofuni. Men tey flestu eru tó upptikin av sangvenjingini í stóra salinum.

- Endamálið við sangskeiðnum er fyrst og fremst at koma saman og syngja Gleðiboðskapin, fortelur Eyðgerð Kristiansen okkum. Hon situr saman við fimm øðrum í eini nevnd, hvørs uppgáva er at fyriskipa hesi skeið.

Men hon dylur ikki fyri, at tað sosiala eisini hevur stóran týdning fyri eitt slíkt skeið, tí luttakararnir bæði sova og eta í leguhúsinum allar teir dagarnar, sum skeiðið varir.



*Dagarnir á sangskeiðnum ganga við venjing og aftur venjing. Í meðal verður sungið 5 tímar um dagin*

Dagarnir ganga annars við venjing og aftur venjing, men eisini er pláss fyri einum bíbliutíma og hugnaløtu um kvøldið.

Tey vaksnu hava sína skrá, sum tey fylgja, meðan børnini hava eina aðra skrá at ganga eftir. Eisini tey smærru hava sítt egna kór, so stórur partur av degnum hjá teimum fer eisini við venjing. Tá tey ikki venja, so spæla tey onkur spølini saman við teim vaksnu hjálparfólkunum

### Konsert í Norðurlandahúsinum

Tað er norski Jostein Myklebust, sum leiðir stóra kórinum hetta árið. Hann er útbúgvin operasangari og starvast eisini dagliga við tónleiki. Harumframt hevur hann undirvíst á bíbliuskúlanum á Bildøy, har nógvir føroyingar hava gingið.

Birita Hansen av Saltangará hevur ábyrgdina av barnakórinum.

Sangskeiðið byrjaði seinasta sunnukvøld, og heldur áfram til í dag, leygardag. Endabresturin verður tvær konsertir, sum verða hildnar í Norðurlandahúsinum í dag klokkan 15.00 og 17.00.

Eyðgerð Kristiansen greiðir frá, at stórur áhugi plagar at vera fyri hesum konsertum. Ofta hevur verið útselt fleiri tímar áðrenn, og skeiðluttakararnir síggja sum vera man eisini fram til konsertirnar.

Eyðgerð greiðir víðari frá, at konsertin byrjar við barnakórinum, og síðani trínur stóra kórið pallin.

- Sangúrvælið er fjølbroytt, men er fyri tað mesta sokallað Black Gospel. Í ár verður tó eisini okkurt klassiskt lag á skránni, har eitt sjónband eisini verður víst, sigur Eyðgerð.

Konsertin verður tikin upp av SvF, umframt at leguhúsið í Nesvík seinni gevur fløgu út við øllum løgunum. Hesa fløgu kunnu luttakararnir síðan ogna sær sum ein minnislut um heystfrítíðina 2002.

Atgongumerki til stóru konsertina í Norðurlandahúsinum fáast í forsølu á Kunningarstovuni í Havn, og eisini í Norðurlandahúsinum. Kostnaðurin er 75 krónur fyri vaksin, og 40 krónur fyri børn.

Δ





*Marjun Thomsen, 15 ára gomul*

Marjun Thomsen er 15 ára gomul, og kemur av Strondum. Hon hevur luttikið á skeiðnum nakrar ferðir fyrr, men hetta er næstu ferð, at hon er við í tí stóra kórinum.

- Mær dámar ordiliga væl at syngja, og so havi eg fleiri vinfólk, sum eisini eru í Nesvík, greiðir hon frá.

Heima á Strondum er Marjun við í ungdómskórinum"Effata", men tað kann ikki samanberast við skeiðið í Nesvík.

- Her eru nógv meir fólk, og so syngja vit eisini heldur lívligari sangir enn í "Effata", greiðir hon frá.

Marjun heldur, at kórleiðarin úr Noregi er stak dugnaligur og dugir væl at fáa øll við í sangin, og so gleðir hon seg til konsertina í Norðurlandahúsinum.

Tá hon ikki syngur, so hugnar hon sær saman við vinfólkunum og slappar av.



*Ingi Jansson, 9 ára gamal*

Ingi Jansson er 9 ára gamal, og kemur úr Kvívík. Hann er í Nesvík saman við mammu síni.

- Eg havi ofta verið í Nesvík fyrr, og her er ordiliga stuttligt, heldur hann.

Ingi greiðir okkum frá, at tað er deiligt at hava frí frá skúlanum, og at hann ikki tímur í skúla aftur mánadagin.

Hann hevur ikki gjørt so nógv, meðan hann hevur verið í Nesvík. Ingi kennir fleiri av hinum børnunum, sum eisini eru á skeiðnum, so fyri tað mesta hevur hann spælt saman við teimum.

- Eg tími ikki altíð at syngja - eg vil heldur sleppa at rógva í bátinum, sum liggur í hylinum uttanfyri, fortelur Ingi okkum.

# Stór klæði til tey ungu



*Nýggi handilin X-Size selir street wear og hip-hop klæði til tey yngru*

**Í dag, leygardag, letur nýggjur klædnahandil upp í Havn. Klæðini, sum X-Size fer at selja, eru av slagnum street wear og hip-hop, og harafturat verða eisini skateboards og annað tilhoyr at fáast til keyps**

HANDILSLÍV
*Ragnhild Ellingsgaard*

Klæðini, sum nýggi handilin X-Size fer at selja, eru í stíl við street wear og hip-hop. Hetta eru klæði, sum eru stór og hanga leyst á kroppinum - víðar buksur, sum nærum hanga niðri á knøunum og troyggjur, sum tykjast at verða alt ov stórar.

Slík klædnapløgg eru ofta at síggja á MTV og øðrum sjónvarpsrásum, og nú er túrurin so eisini komin til føroyska ungdómin.

Tað eru Maja og Jákup Jakobsen, sum eiga og reka nýggja handilin, og Maja greiðir frá, at handilin serliga vendir til tannáringar.

Tey eiga sjálvi ein 13 ára gamlan son, og er hann eisini óbeinleiðis orsøk til, at tey gjørdu av at lata upp handil.

- Sonurin hjá okkum var púra villur eftir slíkum klæðum sum hesum, men tað var nærum ógjørligt at fáa fatur á teimum í Føroyum. Tí máttu hann saman við vinunum fara inn á alnótina at bíleggja klæðir, sum síðani vóru send til Føroyar, greiðir Maja frá.

Í juni mánaða í ár var Maja stødd í Íslandi, og har datt hon á ein handil, sum seldi sokallaði street wear og hip-hop klæði. Maja gjørdi ikki mætari enn at fara innar, og fekk hon samstarv í lag við sama handil, sum í dag eisini er heilsøla hjá X-Size.

Klæðini verða sostatt fyrst keypt frá Amerika til Íslands, og síðani frá Íslandi til Føroya.

Merkini, sum X-Size fer at selja, eru av kendum merkjum, og av tí sama liggur prísurin eisini hareftir.

- Fyri tey ungu hevur tað nógv at siga, hvar klæðini koma frá. Tí hava vit valt at tikið bestu merkini, og tá kemur prísurin at verða hareftir. Men hetta er tað, sum tey vilja hava, greiðir Maja frá.

Umframt klæði verða eisini boxershorts, lissir, belti, smýkkir, húgvur, keppar, pannubond og annað at fáa í handilinum.

- Eisini øll professionell útgerð til skateboards verður at fáa í X-Size, so her skuldi verið okkurt til øll, sigur Maja at enda og leggur afturat, at nýggi handilin er fyrsti av sínum slag í Føroyum.

X-Size letur upp leygarmorgunin klokkan 10.00 í hølunum, har Benetton fyrr helt til.